## Alt er avgjørt í fýra kappingum

ÓLAVSØKUKAPPRÓÐUR

*Jóannes Hansen*

Eitt róðrarár, sum higartil ikki hevur verið serliga væl eydnað, kann bjargast við góðum úrsliti og serliga sigri á ólavsøku. Tí er spenningur í øllum FM róðrunum ólavsøkuaftan. Men tað er bara í kappingini millum dreingirnar og 10–mannaførini, at tað er spenningur um FM heitið.

Sílið við gentum og Jarnbardur við kvinnum hava vunnið allar fimm FM kappingarnar higartil í ár og eru tískil longu FM vinnarar. Smyril úr Vági er so at siga FM vinnari í kappingini millum 6–mannafør við monnum, og Kvívíkingur hevur so at siga vunnið FM heitið í kappingini millum 8–mannaførini.

Hóast teir ikki hava møguleika at vinna FM, so hava fleiri bátar vant í Havnini teir seinastu dagarnar. Millum aðrar hava verið at sæð Fípan Fagra, Klaksvíkingurin, Tjaldrið og Strálan.

# Ongar myndir frá kappróðrinum

**Bæði í HR og RSF siga teir seg vera vónbrotnar av avgerðini hjá SvF**

ÓLAVSØKU-KAPPRÓÐUR

*Jóannes Hansen*

Einasti møguleikin, sum tað ber til at fyljga beinleiðis við ólavsøkukapp-róðrinum, er í Útvarpi Føroya. Á vestanstevnu varð ein roynd gjørd at senda endaspurtin yvir internetið. Kristian Eli Zachariasen, formaður í Klaksvíkar Róðrarfelag, stóð fyri royndini. Hann ásannar, at tað vóru byrjunartrupulleikar, men myndirnar sóust, og áhugin var sera stórur.

– Men hetta var ein einstøk roynd, og vit fara ikki at endurtaka hana á ólavsøku, sigur Kristian Eli Zachariasen.

Sjónvarp Føroya bað fyrr í summar um loyvi at senda beinleiðis frá ólavsøkukappróðrinum. Áheitanin fór til Róðrarsamband Føroya, sum viðgjørdi áheitanina og játtaði undir ávísum treytum. Síðani hevur SvF gjørt av ikki at senda. Ivan Niclasen, programmstjóri í SvF, segði við Dimmalætting fyrr í vikuni, at teir hildu ikki, at tað bar til at gera beinleiðis kappróðrarsending uppá tveir tímar, har tað bara var møguleiki at senda eitt korter frá beinleiðis kappróðri. Men teir ætla sær at venda aftur til møguleikan at senda beinleiðis kappróður komandi árini.

Í Havnar Róðrarfelag siga teir seg ikki skilja, at SvF ikki tók av møguleikanum. Heðin Hansen, formaður, og Paul Kragasteen, næstformaður, vísa á, at eitt korter í beinleiðis sending frá kappróðrunum svarar til meiri enn helmingin av samlaðu tíðini, sum tað tekur at avgreiða teir seks FM róðrarnar.

Eisini í Róðrarsambandinum harmast formaðurin Hannis Joensen:

– Í fjør fingu vit eina áheitan frá SvF beint undan ólavsøku. Tá søgdu vit nei, tí tað vóru ikki stundir at viðgera áheitanina, sum skuldi ummælast í HR. Vit hava fingið alt fleiri áheitanir um at arbeiða fyri, at kappróður verður at síggja beinleiðis í sjónvarpinum. Vit hava innanhýsis arbeitt við hesum, og tí vóru vit fegnir, tá SvF setti seg í samband við okkum. Vit tosaðu við HR og SvF, og tað tóktist bera til at mýkja ymsu áhugamálini so mikið nógv, at beinleiðis sending kundi koma uppá tal.

Áhugamálið hjá SvF var at senda so nógv, sum tað bar til, og hjá HR hevur tað týdning, at teir ikki missa inntøkur. Hannis Joensen sigur, at teir settu einki metratal á í samráðingunum við SvF, og hann sigur seg undrast á grundgevingina hjá sjónvarpinum fyri ikki at senda.

– Vit halda, at tað eru innanhýsis viðurskifti í SvF, sum munnu vera orsøkin, tí tað ber illa til at ímynda sær, at umstøðurnar skulu gerast nógv betur at senda, enn tað varð lagt upp til, at tær skuldu vera. Vit sóu uppleggið hjá SvF fyri kappróðrarsendingini. Tað hildu vit vera gott og spennandi, og SvF hevði fingið nógvar vinir millum kappróðrarhugaðu føroyingarnar kring alt landið, um teir høvdu hildið seg til tað, sum teir ætlaðu. Men vit vóna, at tað verður betur eina aðra ferð, heldur Hannis Joensen, formaður í RSF.




*Nú verður so spennandi, hvørjar bátsmanningar fara avstað við seinastu heiðusmerkinum í kappróðrinum í ár*

## Bátarnir liggja í hesi nummarrøð í kappróðrinum á Ólavsøku tann 28.Juli.2002

**5-mannafør, dreingir**

| nr. | bátur | kort |
|---|---|---|
| 1 | Junkarin | |
| 2 | Havfrúgvin | |
| 3 | Tjaldrið | |
| 4 | Blikur | |
| 5 | Sílið | |
| 6 | Fípan Fagra | |
| 7 | Drekin | |
| 8 | Ørnin | |
| 9 | Drekin | |
| 10 | Havfrúgvin | 1G |
| 11 | Tjaldrið | |
| 12 | Frúgvin | 1G |
| 13 | Broddur | |
| 14 | Dúgvan | |

**6-mannafør, kvinnur**

| nr. | bátur | kort |
|---|---|---|
| 1 | Lómur | 1G |
| 2 | Hvessingur | |
| 3 | Gongurólvur | |
| 4 | Riddarin | |
| 5 | Jarnbardur | |
| 6 | Páll Fangi | 1G |
| 7 | Víkingur | |
| 8 | Snopprikkur | |

**5-mannafør, gentur**

| nr. | bátur | kort |
|---|---|---|
| 1 | Junkarin | 1G |
| 2 | Firvaldur | |
| 3 | Royndin Fríða | |
| 4 | Tekla | |
| 5 | Ørnin | 1G |
| 6 | Blikur | |
| 7 | Fípan Fagra | 1G |
| 8 | Sílið | |

**6-mannafør, menn**

| nr. | bátur | kort |
|---|---|---|
| 1 | Snopprikkur | |
| 2 | Hósvíkingur | |
| 3 | Sølmundur | |
| 4 | Hvessingur | |
| 5 | Páll Fangi | |
| 6 | Smyril | |
| 7 | Gongurólvur | |
| 8 | Strálan | |
| 9 | Jarnbardur | 1G |
| 10 | Víkingur | |
| *51* | *bátsmanningar í alt* | |

**8-mannafør**

| nr. | bátur | kort |
|---|---|---|
| 1 | Húsavíkingur | 1G |
| 2 | Nevið Reyða | |
| 3 | Argjabáturin | |
| 4 | Kvívíkingur | |
| 5 | Knørrur | |
| 6 | Ørvur | |

**10-mannafør**

| nr. | bátur | kort |
|---|---|---|
| 1 | Klaksvíkingur | |
| 2 | Eysturoyingur | |
| 3 | Havnarbáturin | |
| 4 | Vestmenningur | |
| 5 | Nólsoyingur | |

## Úrslit fyri árið eftir Ólavsøku tann 28.Juli.2002

**5 mannafør-dreingir:**

| nr. | | stevnur | kort | Stig |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Fípan Fagra | 5 | | 25 |
| 2 | Blikur | 5 | | 24 |
| 3 | Sílið | 5 | 1R | 24 |
| 4 | Tjaldrið | 5 | | 15 |
| 5 | Havfrúgvin | 5 | | 13 |
| 6 | Drekin | 5 | | 8 |
| 7 | Ørnin | 5 | | 1 |
| 8 | Junkarin | 5 | | 0 |
| 9 | Firvaldur | 2 | | 0 |
| 10 | Tekla | 5 | | 0 |
| 11 | Royndin Fríða | 5 | | 0 |
| 12 | Dúgvan | 5 | | 0 |
| 13 | Firvaldur | 4 | | 0 |
| 14 | Broddur | 3 | | 0 |

**5 mannafør-gentur:**

| nr | | stevnur | kort | stig |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Sílið | 5 | | 35 |
| 2 | Fípan Fagra | 5 | 1G | 24 |
| 3 | Blikur | 5 | | 16 |
| 4 | Ørnin | 5 | 1G | 13 |
| 5 | Havfrúgvin | 5 | 1G | 10 |
| 6 | Drekin | 5 | | 8 |
| 7 | Tjaldrið | 5 | | 0 |
| 8 | Frúgvin | 5 | 1G | 0 |
| 9 | Junkarin | 5 | 1G | 0 |

**6 mannafør-kvinnur:**

| nr. | | stevnur | kort | stig |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Jarnbardur | 5 | | 35 |
| 2 | Riddarin | 5 | | 23 |
| 3 | Páll Fangi | 5 | 1G | 22 |
| 4 | Gongurálvur | 5 | | 15 |
| 5 | Víkingur | 5 | | 7 |
| 6 | Hvessingur | 5 | | 4 |
| 7 | Lómur | 5 | 1G | 3 |
| 8 | Snopprikkur | 4 | | 2 |
| 9 | Sølmundur | 1 | | 0 |

**6 mannafør-menn:**

| nr. | | stevnur | kort | stig |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Smyril | 5 | | 33 |
| 2 | Páll Fangi | 5 | | 26 |
| 3 | Hvessingur | 5 | | 15 |
| 4 | Gongurálvur | 5 | | 14 |
| 5 | Strálan | 5 | | 9 |
| 6 | Sølmundur | 5 | | 8 |
| 7 | Snopprikkur | 4 | | 0 |
| 8 | Jarnbardur | 5 | 1G | 0 |
| 9 | Hósvíkingur | 5 | | 0 |
| 10 | Víkingur | 4 | | 0 |

**8 mannafør:**

| nr. | | stevnur | | stig |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Kvívíkingur | 5 | | 33 |
| 2 | Argjabáturin | 5 | | 27 |
| 3 | Knørrur | 5 | | 20 |
| 4 | Húsavíkingur | 5 | 1G | 11 |
| 5 | Nevið Reyða | 3 | | 9 |
| 6 | Ørvur | 3 | | 5 |
| 7 | Kvívíksbáturin | 2 | | 3 |

**10 mannafør:**

| nr. | | stevnur | kort | stig |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Eysturoyingur | 5 | | 27 |
| 2 | Havnarbáturin | 5 | | 26 |
| 3 | Vestmenningur | 5 | | 23 |
| 4 | Klaksvíkingur | 5 | | 19 |
| 5 | Nólsoyingur | 5 | | 10 |



# Símun Eliasen møguliga við

**HB og NSÍ hava einaferð áður leikt steypafinalu, hetta var í 1988, og tá dróg HB longra stráðið**

STEYPAFINALAN, MENN

*Páll Holm Johannesen*

Fyrrverandi landsliðsleikarin úr Fuglafirði, Símun Eliasen, verður møguliga at síggja á HB-liðnum ólavsøkudag. Hann er heima í summarfríð, og hevur hann vant dúgliga við havnarmonnum.

Hóskvøldið var HB í Gøtu og spældi venjingardyst, og Símun Eliasen var at finna á vøllinum í Gøtu. Endaligi hópurin til finaluna um Løgmanssteypið varð úttikin í gjárkvøldið, og tá blaðið fór til prentingar, var ikki greitt, um Símun var við í endaliga hópinum.

### HB flest steypasigrar

Síðan farið varð undir steypakappingarnar í 1955, hevur HB verið einaráðandi í kappingini. Av 47 møguligum steypasigrum hevur HB vunnið 25, og er hetta fleiri enn øll hini feløgini tilsamans.

Bert einaferð áður hava HB og NSÍ møtst í steypafinaluni. Hetta var í 1988, tá kappast var um Ísafjarðarsúluna, og tá vann HB dystin. Í tí dystinum var Jan C. Dam á liðnum hjá HB, og nú 14 ár seinni verður hann eisini við, tá liðini fara tørna saman fyri aðru ferð.

Seinast HB vann steypafinaluna var í 1998, tá felagið umframt steypakappingina eisini vann landskappingina. Finaludysturin endaði við 2-0 til HB ímóti KÍ. Í 2000 var HB aftur í finaluni, men tá máttu teir lúta fyri gøtumonnum.

### Allir tøkir

Úr HB siga tey, at allir mans eru tøkir undan steypafinaluni. Eftir seinasta leikumfarð undan steðginum í landskappingini, fingu HB-leikararnir eina viku í feriu, og so varð herjað á aftur við venjingini.

Vant hevur verið so at siga hvønn dag, og menn eru væl fyri, verður sagt úr Havn. Síðstu vikurnar hava fleiri av leikararnum tikið sær frí frá arbeiði, so at møguleiki hevur verið at vant tvær ferðir um dagin. Hesa síðstu vikuna hava næstan allir spælarnir vant tvær ferðir um dagin, so ikki kann sigast annað enn, at havnarmennirnir taka uppgávuna í álvara.

### Spælt tveir venjingardystir

Sum liður í fyrireikingunum til finaluna um Løgmanssteypið, hevur HB leikt tveir venjingardystir.

Sunnudagin vóru toftamenn á vitjan á Tórsvølli, og havnarmennirnir vunnu ein tryggan 3-0 sigur. HB var nógv betri enn B68 sunnudagin, og sigurin var sannførandi. Málini skutu Nicu Dogaru, Rúni Nolsøe og Bjarni Jørgensen

Hóskvøldið var HB í Gøtu, og tann dysturin endaði við javnleiki 1-1. Bæði liðini sýndu gott fótbóltsspæl, hóast veðrið ikki var av tí besta. Ímillum áskoðararnar í Gøtu var landsliðsvenjarin, Henrik Larsen, ið eisini verður at síggja á Tórsvølli ólavsøkudag.

### Verða í Havn á ólavsøku

Havnarfelagið hevur ongar ætlanir at fara úr Havnini á ólavsøku. Eitt nú í fjør fór B36 inn á Svangaskarð at binda frið undan steypafinaluni, men tað hevur HB so ikki valt at gera í ár.

Ætlanin er at venja í dag, og í annaðkvøld samlast HB-leikararnir til eina hugnaløtu.

# -Skuldu heldur spælt á graslíki



**HB eru eyka uppsettir til finaluna, nú runavíkingar hava ognað sær forkunnugan áleypara úr Danmark, sigur Rógvi Jacobsen undan finaluni um Løgmanssteypið**

STEYPAFINALAN, MENN

*Páll Holm Johannesen*

Klaksvíkingurin í HB, Rógvi Jacobsen, er ikki samdur í teirri áskoðan, at finalan um Løgmanssteypið skal leikast á Tórsvølli.

- Vit spæla alt ov lítið á grasi, til at ein so týdningarmikil dystur skal leikast á tí undirlagnum, og tí átti dysturin heldur verðið á ovara vølli. Dysturin verður av tí sama sjáldan líka góður, tí leikferðin á grasi er væl lægrið, og sami stemningur er heldur ikki á Torsvølli, sum á ovara vølli, sigur miðvallarin við Sosialin

Annars væntar Rógvi Jacobsen ein harðan dyst, tí bæði lið fara geva seg fult út, og vónar sjálvsagt, at HB vinnur finaluna. Vit eru sera uppsettir, og kanska eyka uppsettir nú teir hava fingið sær ein danskara og hava verið á venjingarlegu.

Rógvi Jacobsen hevur einaferð áður verið í finaluni um Løgmanssteypið, tað var í 1999, tá KÍ vann á B36, og nú verður spennandi um Rógvi eisini vinnur sína seinnu finalu.

# - Vit vinna



*HB-framherjin, Andrew av Fløtum, er ikki í iva um úrslitið á ólavsøku*

*Mynd: savnsmynd*

**Andrew av Fløtum væntar, at HB-áskoðararnir verða í minniluta í finaluni um Løgmanssteypið**

STEYPAFINALAN, MENN

*Páll Holm Johannesen*

Ein av stóru profilinum í landskappingini í ár, Andrew av Fløtum, er ikki í iva um úrslitið á Ólavsøku,

- Sjálvandi vinna vit finaluna, sigur HB-framherjin við Sosialin.

Andrew hevur áður verið í tveimum steypafinalum, og hevur vunnið tí einu. Hetta var í 1998, tá HB vann 2-0 á KÍ, og tá skeyt Andrew annað málið fyri havnarliðið.

- Eg vænti ein tættan og spennandi dyst, og um veðrið heldur sær, so vænti eg eisini heilt fitt av áskoðarumj til dystin, fortelur Andrew av Fløtum.

Andrew roknar við, at HB-áskoðararnir verða í minniluta í steypafinaluni, tí væntandi verður øll Eysturoyggin aftan fyri runavíkingar, og tey, ið ikki stuðla HB í Havn, fara eisini at stuðla NSÍ.

Andrew greiðir frá, at HB-spælararnir hava verið rættiliga upptiknir av finaluni allan juli-mánaðin, og fyri at vera so væl fyri sum gjørligt, hava fleiri spælarar tikið sær feriu til at venja tvær reisur um dagin.